inni - trygt og ómaksleyst til hús www.inni.fo



# Ynskir tú hetta útsýnið?

Nú hevur tú møguleikan











## Hugnaligu húsini á Lágarvegi 8 á Strondum við hesum frálíka vakra útsýninum eru til sølu

### Fyrsta fatanin

Fyrsta fatinum, tá tú kemur til húsini, er, at her er talan um eini sera hugnalig og snøgg eldri hús.

### Húsini

Húsini eru dagførd og eru í góðum standi. Øll miðhæddin og loftshæddin er gjørd av nýggjum. Eisini hava húsini nýggjan klæðning, tak, vindeygu og gólv. Húsini eru klár at flyta inn í, tær nýtist als einki at gera.

### Ljós og luft

Húsini standa væl fyri í bygdini, her er veðurgott og frálíkt útsýni út yvir Skálafjørðin og suður á Nólsoynna.

### Stílur og snið

Stílurin er nýmótans, lættur og ljósur, og høgt er uppundir loftið. Køkurin er bert fá ára gamal, og baðirúmið er gjørt av nýggjum við brúsu og hita í gólvinum. Gólvini eru ljós og eins um alt húsið. Tað er ein fragd at seta innbúgvið inn í slíkar karmar.

### Umhvørvið

Umhvørvið er friðaligt og tó ert tú beint við allar hentleikar: handil, bygdahús, fótbóltsvøll, nýggjan dagstovn við frítíðarskúla, barnagarð og vøggustovu.

### Innrætting

Í miðhæddini er durur við trappuuppgongd, køkur/alrúm, stova, vaskirúm og baðirúm við brúsu. Í ovastu hædd er hjúnarrúm, 2 kømur og stór goymslurúm undir væðingunum. Í niðastu hædd er kjallararúm/fýrrúm.

## Fakta:

**Adressa:** ........Lágarvegur 8, Strendur
**Býggiár:** ........1925
**Hæddir:**.........3
**Gólvvídd:** ......107 m²
**Grundøki:** .....220 m²
**Hjallur:** ..........ja
**Prísuppskot:**..Hóskandi boð ynskist



inni

P/F Inni | Niels Finsens Gøta 37 | P.O. Boks 364 | FO-110 Tórshavn | inni@inni.fo | Tlf. 320 410 | Fax 320 510